# Frásøgn frá CESCR-hoyring í Genève 8.-9. Oktobur 2019

Í døgunum 8. Og 9. Oktobur var Kongsríkið Danmark til hoyring í Altjóða Semjuni um búskaparlig-, sosial- og mentanarlig rættindi (CESCR – Convention on Economic, Social and Cultural Rights). Hoyringin fór fram á ST-sætinum fyri mannarættindi, Palais Wilson, í Genève. Sendinevndin varð umboða við embætisfólki úr avvarandi ráðum úr Danmark, Føroyum og Grønlandi. Úr Føroyum luttóku Birita Ludvíksdóttir (HMR), Jákup Andrias Kristiansen (AMR, og Hanna í Horni (UMMR), sum eisini var sendileiðari.

Stutt eftir hoyringina, kom CESCR-nevndin við fylgjandi tilmæli, sum tey ynskja at fáa dagførda kunning um innan 24 mánaðir eru farnir:

- At Føroyar seta á stovn eina mannarættindaeind við fullum mandati sambært ásetingunum í semjuni (Covenant) og sum eisini lýða Paris-prinsippunum (Paris Principles[1]). (Pkt. 17 í Concluding observations on the sixth periodic report of Denmark, sí viðlagda skjal)

Harumframt mælti nevndin til at fáa til vega hagtøl, ið betur kunnu lýsa støðuna hjá borgarunum á búskaparliga-, sosiala- og mentanarliga økinum (Pkt. 10 og 11 í Concluding observations), her undir eisini hagtøl, ið lýsa lønarmunin millum kynini (Pkt. 32 í Concluding observations). Her skal viðmerkjast, at ein verkætlan við lønarhagtølum er sett í verk. Verkætlanin er býtt upp í trý stig; annað stigið er í gongd nú, og triðja (og seinasta) stigið verður sett í gongd í januar 2020.

**<u>Hoyringin 8.-9. oktobur</u>**

Føroyar fingu fylgjandi spurningar:

- Hvør er støðan viðvíkjandi tilgondini at seta á stovn eina mannarættindaeind í Føroyum?
- Hvørjar eru avleiðingarnar av øktu ferðavinnuni í Føroyum í mun til Altjóða Semjuna um búskaparlig-, sosial- og mentanarlig rættindi og verða atlit tikin til greinirnar í semjuni í politikkinum, ið verður førdur á ferðavinnuøkinum? (spyrjarin hevði lisið um 'Closed for Maintenance' átakið hjá Visit Faroe Islands)
- Hvørjar avleiðingar hevur ferðavinnan fyri arbeiðsmarknaðin ?

[1] Adopted in 1993 by the United Nations General Assembly, the Paris Principles require NHRIs to:

- **Protect** human rights, including by receiving, investigating and resolving complaints, mediating conflicts and monitoring activities; and
- **Promote** human rights, through education, outreach, the media, publications, training and capacity building, as well as advising and assisting the Government.

The Paris Principles set out six main criteria that NHRIs require to meet:

- **Mandate and competence**: a broad mandate, based on universal human rights norms and standards;
- **Autonomy from Government**;
- **Independence** guaranteed by statute or Constitution;
- **Pluralism**;
- **Adequate resources**; and
- **Adequate powers of investigation**.

- Hvørja ávirkan hevur virksemið hjá Bústøðum á bústaðarmarknaðin í Føroyum?
- Hvørji úrslit og hvørja ávirkan hevur átakið í móti kynsligum ágangi havt?

**Til fyrsta spurning** varð svarað, at undir farna landsstýri setti landsstýrismaðurin í Uttanríkis- og Vinnumálum ein arbeiðsbólk at kanna, hvussu ein mannarættindaeind, ella ráð, kann verða skipað í Føroyum. Tilmælið varð handað landsstýrismanninum í 2017, men støða varð ikki tikin til tilmælið, tá løgtingsval varð útskrivað. Nýggja landsstýrið hevur sitið so stutt og hevur tí enn ikki fingið tikið støðu til tilmælið.

**Til annan og triðja spurning** varð svarað, at rætt er, at seinastu árini er talið á ferðafólkum økt munandi og í ár vitjaðu um 110.000 ferðafólk Føroyar, av hesum komu um 50.000 við ferðamannaskipum. Hetta hevur sjálvandi eina ávirkan á føroyska samfelagið og ikki minst á náttúruna. Átøk hava tí verið sett í verk til tess at verja um náttúruna á ymsan hátt. ‘Closed for Maintenance’ var eitt av hesum átøkunum, ið eisini varð við til at varpa altjóða ljós á møguligu árinini av ótálmaðari ferðavinnu á náttúruna. Ætlanin er at endurtaka átakið næsta ár. Eisini hevur landsstýrið arbeitt við eini margfeldislóg, men hendan náddi ikki á mál, áðrenn valið varð útskrivað.

Viðvíkjandi arbeiðsmarknaðinum, so hevur økta talið av ferðafólki ført við sær, at nógv arbeiði er tókt til teirra við lítlari og ongari útbúgving, og teimum, sum ikki hava føroyskt sum móðurmál, og hetta merkir, at arbeiðsloysið er metlágt, einans 1,2%, harav meir enn helvtin (54%) einans eru arbeiðsleys í minni enn 3 mánaðir.

**Til fjórða spurning** varð svarað, at síðani Bústaðir fór undir at byggja, umvæla og leiga út bústaðir í 2012, hevur almenna bústaðafelagið útvegað 333 leigubústaðir. Í løtuni eru stórar byggiverkætlanir í gongd, og komandi árini koma væntandi einar 200 leigubústaðir afturat. Hetta ljóðar kanska ikki av nógvum, men sæð í mun til fólkatalið er talan um eitt stórt frambrot. Svarar til, at mann í Danmark hevði bygt 33.000 almennar leigubústaðir uppá 7 ár

Bústaðir leggur stóran dent á at byggja inkluderandi.  Ynski er, at borgarar úr øllum samfelagsstættum kunnu búgva lið um lið í einum og sama grannalagi. Leigubústaðirnir hjá Bústøðum hava tí altíð eina ávísa góðsku, og øll – uttan mun til inntøkur – hava møguleika at skriva seg upp til eina íbúð. Í minsta lagi 10 % av íbúðunum hjá Bústøðum eru rørsluvinarligar.

Avbjóðingin hjá Bústøðum er at halda húsaleiguna á einum støði, sum øll hava ráð at gjalda – eisini láglønt. Húsaleigan hjá Bústøðum er 100 % kostnaðartreytað; ongin vinningur verður roknaður uppí leiguna. Harafturat brúkar Bústaðir sína eginogn til at tryggja lágar leigur í sambandi við nýbygging. Hetta verður gjørt við, at Bústaðir letur ein grundkapital á 30 % av íløguni, sum er rentu- og avdráttarfríur í 30 ár eftir, at íløga verður gjørd í eina verkætlan. Hini 70 % av íløgukostnaðinum verða rentað við 2,75 % yvir 30 ár. Úrslitið er, at húsaleigurnar hjá Bústøðum eru væl lægri enn marknaðarleigan annars.

Sambært leigulógini hevur Almannaverkið ávísingarrætt til í minsta lagi 5. hvørja íbúð hjá Bústøðum. Hesar íbúðir verða tillutaðar borgarum, sum annaðhvørt av kropsligum ella sálarligum ávum eru varandi skerdir.

Síðani almenna bústaðafelagið fór undir sítt virksemi, eru fleiri og fleiri privatir aktørar farnir undir at byggja leigbústaðir. Mett verður, at hetta er ein beinleiðis avleiðing av, at almenna bústaðafelagið hevur víst, at tað er ein stórur eftirspurningur eftir leigubústøðum í Føroyum.

**Til fimta spurning** varð svarað, at vit tíanverri ikki hava nøkur beinleiðis prógv um úrslit av átakinum móti kynsligum ágangi, men at ongin ivi er um, at átakið hevur vakt ans og gjørt føroyingin tilvitaðan um evnið. Átakið fekk nógva umrøðu í almenna rúminum.

Átakið hevur verið endurmett í Almannaráðnum og avrátt er, at átakið heldur áfram sum partur av øðrum átøkum ímóti harðskapi. Harumframt skipa politiið, heilsumyndugleikar og Amnesty í felag fyri eini upplýsingarátaki eina viku árliga við heitinum 'Sex krevur samtykki'.

Møguleikarnir fyri ókeypis viðgerð, bæði hjá tí, sum hevur framt ágangin, og hjá teimum, sum hava verið úti fyri kynsligum ágangi sum børn, eru óbroyttir.

Upptøkur av hoyringini liggja úti á heimasíðuni hjá ST:

Hoyringin 08.10.2019: http://webtv.un.org/watch/consideration-of-denmark-44th-meeting-66th-session-committee-on-economic-social-and-cultural-rights/6093376410001/?term=

Hoyringin 09.10.2019: http://webtv.un.org/watch/consideration-of-denmark-contd-45th-meeting-66th-session-committee-on-economic-social-and-cultural-rights/6093418628001/?term=